

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 10 - 2011

# BP fær 20 milliardir aftur

Bretska oljufelagið BP og tað amerikanska Andarko hava gjørt semju um, at tað amerikanska felagið skal rinda tí bretska góðar 20 milliardir krónur í sambandi við dálkingarvanlukkuna í Meksikoflógva í fjør. Andarko eigur Maconda-brunnin, sum Deepwater Horizon arbeiddi í, tá pallurin brádliga sprongdist, og oljan rann út í havið. Amerikonsku myndugleikarnir áløgdu BP at rinda tað, sum tað kostaði at taka oljuna uppaftur, og felagið hevur síðani roynt at fáa onnur feløg at átaka sær ein part av útreiðslunuum. Umframt tær umleið 20 milliardir krónurnar ber semjan við Andarko í sær, at BP yvirtekur 25 prosent av Maconda-brunninum. Leiðslan í BP vónar nú, at tað fer at bera til at fáa tilsvarandi semju við veitarafeløgini Transocean og Halliburton. So seint sum í síðstu viku gjørdu teir amerikonsku myndugleikarnir av at revsa BP, Transocean og Halliburton fyri at hava brotið trygdarreglurnar, sum eru galdandi fyri oljuvinnu í Meksikoflógva.